## Rúsdrekka- og Narkotikaráðið heldur ársfund

**Danskur sálarfrøðingur fer á ársfundinum at halda fyrilestur um, hvussu til ber at hjálpa børnum, hvørs foreldur eru rúsevnismisnýtarar**

SOSIALMÁL
*Edvard Joensen*

Rúsdrekka- og Narkotikaráðið heldur í dag ársfund á Runavíkar Sjómansheimið. Evnið á fundinum í ár er: »Børn, sum vaksa upp í heimum, har rúsevni verða misnýtt.«

Til ársfundin í ár er komin danskur fyrilestrahaldari. Tað er sálafrøðingurin, Lisbeth Rask, sum í mong ár hevur starvast við børnum og familjum, verður sagt í tíðindaskrivi frá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum.

Lisbeth Rask fer at halda fyrilestur um, hvussu vit kunnu hjálpa børnum, hvørs foreldur eru rúsevnismisnýtarar, og eisini, hvussu vit kunnu hjálpa foreldrunum.

Eisini tveir føroyingar, sum hvør í sínum lagi hava havt samband við fólk, sum hava rúsevnistrupulleikar, fara at luttaka á ársfundinum við hvør sínum innleggi.

Formaðurin í barnaverndini í Tórshavn, Beate L. Samuelsen, fer at lýsa evnið frá sjónarhorninum hjá barnaverndini, og Arne Ludvig, fyrrverandi skúlastjóri, fer at lýsa evnið frá skúlans sjónarhorni.

Formansfrágreiðingin verður eisini løgd fram á fundinum, sum byrjar á Runavíkar Sjómansheimi í dag klokkan 14.00 og er settur at vara í góðar tveir tímar.

# Sigfríður fer úr politikki

**Sigfríður Vørðhamar stillar ikki upp til býráðsvalið í Fuglafirði hesaferð. Hann gevst eftir at hava sitið í bygdar- og býráðnum í 24 ár**

*Sigfríður Vørðhamar, nr. tvey frá vinstru, gevst nú eftir at hava luttikið í 24 ár í kommunalpolitikki í Fuglafirði*
*Mynd: Sveinur Tróndarson*

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*

Eftir at hava luttikið aktivt í kommunalpolitikki í 24 ár, stillar Sigfríður Vørðhamar í Fuglafirði ikki upp aftur til valið í november. Av teimum 24 árunum, hann hevur sitið í bygdar- og býráðnum, hevur hann verið formaður tey 12.

Sigfríður Vørðhamar sigur, at hann hevur valt at fara av nú, meðan hann sjálvur fann landgongina, sum hann tekur til. Hann hevur egið virkið, sum hann heldur, at hann nú skal brúka meira tíð uppá, sigur hann.

Eftir at hava verið so leingi uppi í politikki, er tað heilt natúrligt, at hann fer at sakna tað, heldur Sigfríður Vørðhamar. Men hinvegin gevur tað eisini betri møguleikar at gera viðmerkingar til ymisk mál, sum uppi eru. Tí hóast hann gevst, er hugurin fyri samfelagsviðurskiftum ikki farin. Verri enn so, sigur hann.

Men tað kann verða spennandi at vera áskoðari við politiska vøllin eftir øll hesi árini, sigur hann. Tó hevur hann eitt ávíst liða at halda við, skilst, tí hann er stillari hjá einum borgaralista, sum stillar upp í Fuglafirði.

Jú, tað verður undarligt, men nú er tíð at lata onnur sleppa framat, heldur Sigfríður Vørðhamar, sum á nýggjárinum verður fyrrverandi býráðspolitikkari í Fuglafirði.

Tveir partapolitiskt óheftir borgaralistar eru gjørdir til býráðsvalið í Fuglafirði. Í tíðindaskrivi, stillarar hjá øðrum av hesum listunum hava sent, verður dentur lagdur á, at talan er ikki um partapolitiskan lista, men at einans er hugt at valbærinum hjá valevnunum, tá listin varð gjørdur.

Á øðrum borgaralistanum, Sosialurin hevur fingið, eru valevnini hesi:

Eivind Breiðáskarð, handilsmaður, Bjarni Eliasen, bilsmiður, Símun Jákup Eliasen, goymsluleiðari, Sveinbjørn á Horni, timburmeistari, Astrið Højgaard, húsmóðir, øll úr Fuglafirði. Elibert Kerá, virkisleiðari, Hellur, Jón N. Olsen, reiðari, Andreas (Dia) Petersen, húsavørður á Kambsdali. Janus Samuelsen, navigatørur, Martin Simonsen, býráðslimur/stjóri, Sigurð S. Simonsen, býráðslimur/reiðari, Fuglafirði og Ólavur Thomsen góðk. elinnleggjari, á Kambsdali.

Valevnini á seinna borgaralistanum, sendur er Sosialinum, eru hesi:

Kristian O. Christiansen, havnameistari, Randi Gunnarsdóttir, listakvinna, Edva Jacobsen, bankakvinna, Eyðun á Lakjuni, studentaskúlalærari, Páll Larsen, skrivstovumaður, Torfinn Nón, byggifrøðingur, øll úr Fuglafirði. Eydgerð Petersen, dagrøktarleiðari, Kambsdalur. Kristian Petersen, bankamaður, Dinna Poulsen, skrivstovukvinna, Jónsvein Poulsen, fólkaskúlalærari, úr Fuglafirði. Laila Solmunde, skrivstovukvinna av Kambsdali og Jan Toftegaard, býráðslimur/maskinsmiður úr Fuglafirði.

# Ternan fær nýggjar maskinur

**Mánadagin 30. oktober verður Ternan tikin úr sigling og fer at skifta maskinur á Tórshavnar Skipasmiðju**

*Ternan fer nú at skifta høvuðsmaskinur og verður tí tikin úr sigling allan november mánaða*
*Mynd: Edvard Joensen*

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Ternan verður tikin úr sigling allan november mánaða, og meðan hon er á Skipasmiðjuni, fer Sam at røkja siglingina um Vestmannasund.

Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandfaraskipum Landsins, sigur, at arbeiðið við at skifta maskinurnar á Ternuni er mett til at taka fýra vikur. Og tað vænta teir eisini fer at halda. So tá november er av, verður Ternan aftur á Vestmannasundi, sigur hann.

Ternan skal hava tvær nýggjar høvuðsmaskinur. Hon fær tá væl størri maskinorku, enn hon hevur í dag, sigur Magnus Magnussen . Valt varð at skifta út við størri, heldur enn at umvæla verandi maskinur, sigur hann.

Hann sigur, at maskinurnar, sum eru í Ternuni, eru javngamlar við skipið. Í 1980 kostaður tær 1,3 millión krónur. Og tær eru seldar aftur nú fyri 600.000 krónuir, sum Strandferðslan metir vera ein góðan handil. Nýggju maskinurnar kosta triggjar milliónir krónur, og alt arbeiðið fer at kosta fýra milliónir.

Nógvar merkiligar søgur ganga um alt møguligt, tá eitthvørt óvanligt hendir. Nú eru søgur farnar at ganga um, at tá Sam fer at sigla um Vestmannasund, skal hann ikki taka bussar við. Ferðafólk skulu so skifta í Vestmanna og á Oyrargjógv. Men tað er heilt burturvið, verður sagt av Strandfaraskipum Landsins. Tað er beinleiðis tvætl. Slíkt aftur stig ber heilt einfalt ikki til at gera, sigur Strandferðslan. Bussarnir fara eini at ferðast sum vanligt um Vestmannasund, meðan Sam siglir.

Men eingin ivi er um, verður sagt av Strandferðslni, at tað verða fleiri túrar, fólk noyðast at bíða. Tí tað verður bara Sam, sum fer at sigla. Ternan I er upptikin aðrastaðni, og hon hevði annars ikki kunnað verið brúkt, tí hon hevur ikki loyvi at flyta bilar meira. Og annað skip er heilt einfalt ikki til.

So góði, gamli Sam verður álitið um Vestmannasund í november.

Ternan verður aftur á Vestmannsundi til jólaferðsluna, sigur Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandfaraskioum landsins.



# Postverkið skal vera partafelag

**Formaður Tjóðveldisfloksins sigur, at um tað er púra greitt, at ávísar treytir verða uppfyltar, er ikki óhugsandi, at Tjóðveldisflokkurin fer at taka undir við, at Postverkið verður gjørt um til alment partafelag.**

POSTVERKIÐ
*John Johannessen*

Gongd er veruliga komin á aftur ætlanina um at skipa Postverkið sum alment partafelag.

Játtanin til Postverkið er tikin burtur í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001, tí landsstýrið í løtuni arbeiðir við at leggja um Postverk Føroya til alment partafelag.

Tað er nýggi landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum, ið stendur aftan fyri ætlanina.

Í vár royndi Finnbogi Arge úr Fólkaflokkinum, sum tá var landsstýrismaður í vinnumálum, tað sama. Men tá var Tjóðveldisflokkurin so hart ímóti hesi ætlan, at hon ikki gjørdist veruleiki.

*Landsstýrið arbeiðir nú av øllum alvi at gera blái postútberarnar til alment partafelag. Hóast Tjóðveldisflokkurin áður hevur verið ímóti hesum, er nú líkt til, at hann tekur undir við ætlanini*

### Seta treytir

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, sigur, at flokkurin nú hevur valt at lata landsstýrismannin fyrireika eina ætlan um, hvussu Postverkið treytir, at Tjóðveldisflokkurin letur landsstýrismannin arbeiða við hesi ætlan.

Høgni Hoydal sigur, at Tjóðveldisflokkurin hevur kravt, at fagfeløgini skulu takast við upp á ráð í fyrireikingunum, somuleiðis sum ætlanin ikki skal vera liður í einari totalari privatisering.

– Skulu vit taka undir við, at Postverkið skal gerast til alment partafelag, skal tað vera púra greitt, at Postverkið framvegis kann veita øllum borgarum í landinum tær tænastur, eitt postverk hevur skyldu til, sigur Høgni Hoydal. Hann vil, at tað framvegis skal vera ein almenn uppgáva at tryggja øllum borgarum í landinum góða tænastu innan postfluting.

### Post Danmark ónýtiligt

Tá Finnbogi Arge mælti til at gera Postverkið til alment partafelag, mælti Tjóðveldisflokkurin til, at tað heldur skuldi skipast eftir sama bygnaði, sum Post Danmark.

Hetta merkir, at Postverkið framhaldandi hevði verið ein almenn fyritøka, men sum kortini varð rikin eftir einum leisti, ið liggur ímillum ein almennan stovn og eitt partafelag.

Men tá Postverkið í mai mátti fáa eykajáttan fyri ikki at steingja, varð gjørd kann skipast sum ein almenn fyritøka. Tá ætlanin síðani er liðug, fer Tjóðveldisflokkurin at taka støðu til, um hann tekur undir við henni ella ikki.

Men tað er ikki uttan ein løgfrøðislig meting, ið vísti, at Post Danmark modellið ikki er heilt sambæriligt við stýrisskipanarlógina.

Tí hevur landsstýrið valt at fara heilt frá loysnini at skipa Postverkið sum Post Danmark.

Harafturat metir landsstýrismaðurin, at tað ikki loysir seg at kroysta eina danska loysn yvir føroyingar, sum danir enntá ikki sjálvir eru nøgdir við.

– Post Danmark er ein almenn fyritøka, men hetta er leiðslan ikki nøgd við, tí hon vil hava, at fyritøkan gerst eitt alment partafelag, so hon gerst kappingarfør, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

### Væl gjøgnumarbeitt

Allir partar í samgonguni ásanna, at okkurt má henda, fyri at Postverkinum skal vera lív lagað. Tí hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum sett sær fyri at fyrireika ætlanina um at skipa Postverkið sum alment partafelag bæði væl og virðiliga.

Fyrireikingarnar fara fram í neyvum samstarvi við starvsfólkini hjá Postverkinum, leiðsluna, Fíggjarmálastýrið og onnur, ið hava við Postverkið at gera.

Tí væntar landsstýrismaðurin at kunna leggja eina væl gjøgnumarbeidda loysn fyrst fyri landsstýrið og síðani fyri løgtingið um ikki so langa tíð.

# Skilir bløðini

**Tá málið um bygnaðin hjá Postverkinum er avgreitt, fer landsstýrismaðurin í vinnumálum at taka støðu til, í hvønn mun peningur skal játtast Postverkinum til at bera út bløðini**

BLAÐÚTBERING
*John Johannessen*

Bløðini fáa í dag ikki ta tænastu frá Postverkinum, sum tey ynskja. Tí hava tey bæði stóru bløðini sligið seg saman um eitt felag, ið ber út leygardagsútgávurnar.

Men fyri at tað skal loysa seg at hava sítt egna útberarafelag, noyðast bløðini at skipa útberingina soleiðis, at útberarafelagið fer at bera út fleiri útgávur enn bara leygardagsblaðið umframt annan adressuleysan post.

Hetta kann gerast ein hóttan móti Postverkinum, sum hevur bløðini og addressuleysan post sum høvuðsinntøkugrundarlag.

Men kann Postverkið gerast fyrst fyri at bera bløðini út um kvøldið, somuleiðis sum tað aftur kann bera tey út leygardag, eru bløðini meira enn sinnað at halda fram sum kundar hjá Postverkinum.

Hetta hava Dimmalætting og Sosialurin greitt landsstýrismanninum í vinnumálum frá, og skilir hann væl støðuna.

*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

– Tá Postverkið er komið á rætt kjøl, fari eg at taka spurningin um tilskot til útbering av bløðunum upp, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Landsstýrismaðurin metir tað hava týdning, at eisini útoyggjarnar fáa bløðini til hóskandi tíð. Hetta hevur eitt privat útberarafelag ikki ráð til. Tí heldur landsstýrismaðurin tað vera rætt at veita Postverkinum tilskot til hetta.

Í Danmark og í øðrum londum er heilt vanligt, at tilskot verður latið postverkunum til at bera út bløðini. Játtanin á dansku fíggjarlógini í ár til hetta endamál er 450 milliónir krónur.

# Skal lýsa eftir skúlalækna

**Skúlaráðið í Havn hevur samtykt at heita á Helenu Dam á Neystabø um at finna ein skúlalækna til Suðurstreymoy sum skjótast**

Heilsumál
*John Johannnessen*

Eingin skúlalækni hevur verið í Suðurstreymi síðani 1997.

Hetta heldur Skúlaráðið saman við skúlastjórunum vera ov galið. Tí hevur Skúlaráðið, saman við skúlastjórunum á teimum kommunalu skúlunum, á fundi 19. oktober samtykt at heita á Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum, um at lýsa eftir skúlalækna sum skjótast.

Skúlaráðið vísir á, at fyrst í januar 2001 verða átta kommunalir skúlar í kommununi við tilsamans 2.856 næmingum.

Tí metir skúlaráðið tað vera umráðandi at fáa skúlalæknaskipanina at virka sum skjótast.